ítróttur

Nr. 49 • mikudagur • 12. mars 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Flogbólturin blómar í Sørvági

*SÍ hevur havt eitt gott kappingarár í ár. Higartil eru trý føroyameistaraheiti komin í hús. Sunnudagin vóru føroyameistararnir í gentum 16, dreingum 16 og 1.deild kvinnum avmyndaðir*



**Útlendingarnir, Borko Ilic og Rajko Petrovic, hava rættiliga sett síni spor í Sørvági**

FLOGBÓLTUR

*Páll Holm Johannesen*

Hóast føroyameistaraheitið í meistaradeildini glapp SÍ av hondum sunnudagin, so kunnu sørvingar ikki annað enn fegnast um úrslitini hjá felagnum í vetur. Allar FM-kappingarnar eru ikki avgreiddar enn, men longu er greitt, at felagið úr Sørvági vinnur trý meistaraheiti.

Talan er um dreingir og gentur 16 og 1.deild kvinnur. Umframt hesi liðini, so er framvegis møguleiki at vinna fleiri meistaraheiti. Flaggskipið hjá felagnum, meistaradeildin hjá monnum, hevur eisini staðið seg væl í ár.

Nýkosnu greipuvinnararnir úr Fuglafirði vunnu við bit og slit steypafinaluna, eftir ein spennandi fimm-settara. Í landskappingini gjørdust sørvingar eisini ov stuttir, men framvegis eru silvurkrónurnar at kappast um.

### Saðlaðu um

Tað má sigast at vera eitt frálíkt úrslit hjá eini bygd sum Sørvági at hava so góð úrslit at vísa á. Formaðurin í SÍ, Jákup á Stongum, sigur, at góðu úrslitini í ár skulu síggjast yvir arbeiði í fleiri ár.

- Vit høvdu flogbólt, hondbólt og badminton sum vetrar ítróttargreinir til miðskeiðis í 90 árunum, men tá valdu vit í felagnum at satsa uppá eina vetrargrein, og tað gjørdist flogbólturin, greiðir Jákup á Stongum frá.

Felagið legði seg eftir at fáa tilkomnar venjarar til hvønn árgang, so ungdómsarbeiðið varð betri skipað. Í dag spæla børn í Sørvági flogbólt niður í annan flokk, og fleiri og fleiri børn velja at spæla flogbólt. Í Sørvági er ikki so nógv hjá børnum at fara til, og tí hevur flogbólturin líka stórt sosialt virði sum ítróttarligt virði hjá teimum yngstu, fortelur Jákup á Stongum.

### Dyk á í fjør

SÍ hevur seinastu árini verið í meistaradeildini, men ikki fyrr enn í fjør komu rættiligt dyk á.

– Tað gekk ongan veg hjá okkum í meistaradeildini fyrstu árini, og okkurt árið endaðu vit niðastir. Vit høvdu ungar og evnaríkar leikarar, men liðnum vantaði leikarar við royndum. Vit kannaðu møguleikan at fáa onkrar útlendskar leikarar til Sørvágs, og síðan Borko og Rajko komu vestur, hava vit fingið eitt lið, ið kann gera seg galdandi millum tey bestu, sigur formaðurin.

Borko Ilic hevur seinastu tvey árini staðið á odda fyri liðnum í meistaradeildini. Hann kom úr Klaksvík, har hann vandi Mjølnir. Við Borko sum venjara, fekk SÍ sítt besta úrslit í fjør, tá felagið vann steypakappingina.

SÍ vann seg upp í meistaradeildina í 1998, og felagið hevur verið í meistaradeildini síðan. Sørvingar høvdu ein frágera góðan árgang í dreingum føddir í 1979-80, og hesir vóru bulurin á liðnum, sum vann seg upp í meistaradeildini. Millum hesar kunnu nevnast, Jón Nielsen, Jón Falkvard, Kaj á Stongum, Rúni Nielsen og Jógvan Niclasen.

Hóast leikararnir á SÍ-liðnum framvegis mugu roknast sum ungir, so hevur liðið í dag eina góða samantvinning av yngri og eldri leikararum. Undir leiðsluni hjá Borko Ilic, hevur tað eydnast sørvingum at byggja eitt lið upp, sum rættiliga ger seg galdandi í fremstu røð.

### Kvinnurnar eisini við

Seinnu árini er kvinnuflogbólturin komin rættiliga væl við í Sørvági. SÍ hevur vunnið føroyameistaraheitið hjá bæði gentum 16 og 1.deild kvinnum í ár.

Seinni í ár skal 1. kvinnulið hjá SÍ leika uppflytingardyst ímóti niðasta liðnum í meistaradeildini, og spennandi verður, um felagið hevur umboðan í meistaradeildini bæði hjá kvinnum og monnum komandi ár.

Jugoslaviski leikarin í SÍ, Rajko Petrovic, tekur sær av venjingini hjá kvinnuliðunum, og sambært Jákupi á Stongum, eigur hann stóran heiður í góðu úrslitunum í vetur.

– Rajko er rættiliga dugnaligur venjari, og hann hevur lagt nógv fyri við venjingini seinastu tvey árini, og tað hevur sanniliga givið úrslit, sigur formaðurin.

### Seta møguliga ungdómsvenjara

Leiðslan í SÍ hugsar í løtuni um møguleikan at seta ein ungdómsvenjara í fulltíðarstarv fyri komandi vetur.

– Vit hugsa í løtuni um møguleikan, tí vit ivast ikki í, at ein slík íløga hevði kastað nógv av sær, greiðir Jákup á Stongum frá.

Enn er ógreitt, um Borko og Rajko verða í Sørvági komandi ár, men formaðurin vónar, at teir halda fram, tí teir hava rættiliga sett ferð á felagið, síðan teir komu vestur fyri tveimum árum síðani.





*Tað vóru fleiri sera spennandi og tættar kappingar í árligu rútmisku stórkappingini um vikuskiftið. Í kappingini hjá smágentum endaði javnt millum tvey lið, og tí blivu tvey feløg kosin føroyameistarar.*

*Mynd:Jens Kristian Vang*

# Stórkappingin gekk upp á stás

TÍÐINDASKRIV

Ikki kann sigast annað enn at vit eiga nógvir góðir fimleikarar, tað upplivdu vit, sum vórðu til rútmisku Stórkappingina í vikuskiftinum.

Leygardagin kappaðust gentur og kvinnur í einari frí íðkan og eini amboðs íðkan, liðini vóru sera jøvn. Sunnudagin kappaðust pinkur og smágentur. Pinkurnar høvdu bara frí íðkan og smágentur høvdu frí íðkan og amboðs íðkan.

Nógvir áskoðarar vóru og hugdu, og til kappingina sunnudagin blivu eyka sitipláss uppsett.

Kappingarnar eydnaðist sera væl.

Heiðursmerkir blivu givin bæði til frí og amboðs íðkanina, og steyp givin til mest samanløgdu stig.

Bæði leygardagin og sunnudagin hendi tað, at lið fingu líka nógv stig, og til kappingina sunnudagin hendi tað, sum Fimleikasambandi ikki veit at siga er hent áður, at 2 lið fingu líka nógv samanløgd stig. Tað var sera spennandi kapping og sjálvandi var frøðin stór, bæði á fimleikarum og áskoðarum.

Stórkappingin var minnisrík hesuferð.

Føroyameistari hjá kvinnunum gjørdist eisini Havnar Fimleikafelag við 35,75 stigum, og verður tað tær sum skulu til Danmarks meistaraskapi fyrst í maj mánaði, sum gestalið. Spennandi verður at vita, hvussu tær fara at klára seg har.

Fimleikasambandi fegnast um, at tað eydnaðist Klaksvíkar fimleikafelag at verða við tveimum gestaliðum, og vónar at síggja tey við til kappingarnar í næstum.



### Úrslitini hjá pinkunum

| | Frí íðkan |
|---|---|
| Ljósið | 18.00 stig |
| Havnar Fimleikafelag | 17,15 stig |
| Støkk | 16,40 stig |
| Flog | 16,25 stig |

Føroyameistarar hjá pinkunum gjørdis Ljósið við 18 stigum.

### Úrslitini hjá smágentum

| | Frí íðkan | Amboðs bóltar | samanlagt |
|---|---|---|---|
| Havnar Fimleikafelag | 18,10 stig | 17,1 stig | 35,25 stig |
| Ljósið 2 | 17,90 stig | 17,35 stig | 35,25 stig |
| Ljósið 1 | 17,45 stig | 16,85 stig | 34,30 stig |
| Støkk | 17,20 stig | 16,85 stig | 34,05 stig |
| Flog | 16,40 stig | 15,75 stig | 32,15 stig |

Føroyameistari gjørdist bæði Havnar Fimleikafelag og Ljósið 2 við 35,25 stigum.

### Úrslitini hjá gentum

| | Frí íðkan | Amboð! gjarðar | samanlagt |
|---|---|---|---|
| Støkk | 18,0 stig | 17,2 stig | 35,2 stig |
| Havnar Fimleikafelag | 17,9 stig | 17,6 stig | 35,5 stig |
| Ljósið | 17,75 stig | 17,6 stig | 35,35 stig |
| Flog | 15,85 stig | 14,55 stig | 30,4 stig |

Føroyameistarar gjørdist Havnar Fimleikafelag við 35,5 stigum

### Úrslitini hjá kvinnunum

| | Frí íðkan | Amboð Bóltar | samanlagt |
|---|---|---|---|
| Havnar Fimleikafelag | 18,1 stig | 17,65 stig | 35,75 stig |
| Støkk | 17,9 stig | 17,0 stig | 34,9 stig |
| Ljósið | 17,75 stig | 16,5 stig | 34,25 stig |

# Heini í Dali stóð seg væl í kapping í Danmark

**Ungi føroyingurin vónar at sleppa við á oyggjaleikaliðið**

FIMLEIKUR

*Páll Holm Johannesen*

20 ára gamli, Heini í Dali, luttók um vikuskiftið í kapping í fimleiki í Danmark. Heini hevur síðan seinasta heyst vant við einum fimleikafelag úr Næstved. Felagið er í løtuni í triðju deild, og eftir úrslitið um vikuskiftið er rættiliga sannlíkt, at felagið hjá Heina vinnur deildina.

Kappast var á hesti, gólvi, ringum, barr og rekk. Næstved endaði heili 15 stig frammanfyri Nakskov á øðrum plássi. Kappingin er skipað í tveimum unførum, og úrslitið í fyrra umfari telur við í seinna umfarinum.

Á liðnum hjá Heina vóru fimm luttakarar í alt. Einans stigini hjá trimum teimum fremstu luttakarunum í hvørjum felagi telja við. Heini endaði millum tríggjar teir fremstu í fýra av fimm kappingum, og tað má sigast at vera eitt frálíkt úrslit.

### Væl nøgdur

Heini í Dali var sum verða man væl nøgdur við úrslitið hjá sær um vikuskiftið.

– Fimtan stig er rættiliga nógv í fimleiki, so nú skal ganga sera illa, um vit ikki skulu enda ovast eftir seinna umfar, sigur ein fegin Heini í Dali

Spurdur um vónirnar at koma við á oyggjaleikaliðið í summar, svarar Heini, at hann sjálvsagt vónar tað, men ásannar, at tað verður torført.

– Eg skal venja saman landsliðsvenjararnum komandi vikuskiftið, og tá fái eg so eina betri hóming av, hvar eg standi, greiðir at enda Heini í Dali frá.

# Stórt hall í Brøndby

ÚTISETAFELAG

*Páll Holm Johannesen*

Mánadagin kunngjørdi leiðslan í Brøndby ársroknskapin fyri 2002. Úrslitið var eitt stórt hall á góðar 25 milliónir krónur.

Brøndby gjørdi farna árið stóra íløgu í Brøndby Stadion, og byggingin sæst avgjørt aftur í roknskapinum. Í 2001 var úrslitið eitt hall á góðar 16 milliónir, so seinastu tvey árini hevur felagið havt eitt hall á tilsamans 40 milliónir.

Danska meistaraliðið hevði væntað at fingið størri inntøkur av sølu av spælararum, men hetta hevur ikki eydnast. Serliga ein søla av áleyparanum, Peter Madsen, hevði kunnað bøtt mundandi um roknskapin, men honum eydnaðist bara einum leigusáttmála við týska felagið Wolfsburg.

Brøndby-leiðslan væntar eitt yvirskot á eina hálva millión fyri roknskaparárið 2003, men hetta er treytað av sølu av leikararum.